

*– Tað kann følast eitt sindur flovisligt at lata seg avmynda í berum undirklæðum, men eg leggi stóran dent á at myndirnar skulu vera stílfullar, sigur Miriam Gunnarsson.*

**MYNDIR:** MIRIAM GUNNARSSON

# Tølandi myndir til mannin

NÚ VERÐUR GJØRLIGT HJÁ FØROYSKUM KVINNUM AT TAKA TØLANDI **MYNDIR**. TAÐ ER ONNUR HELVTIN AV DUETTINI **MIRJAM&JANUS**, IÐ BJÓÐAR SEG FRAM TIL EITT SOKALLAÐ **»BOUDOIR-MARATHON«**.



**MYNDIR**
**Inna Tørnroos**
inna@sosialurin.fo

– Ætlanin við »Boudoir Marathon« er, at kvinnur kunnu taka tølandi og lekrar myndir av sær sjálvari. Til sín sjálvs ella til tann ein er góður við, sigur Miriam Gunnarsson.

Myndatøkurnar verða 6. og 7. februar, og er meiningin, at maðurin kann fáa myndirnar í gávu 14 februar, tá valentindagurin er.

Tað verður bara Miriam, ið tekur myndirnar, og hon væntar ikki, at føroyskar kvinnur eru ov smædnar til eitt tílíkt tiltak.

– Kvinnur í Føroyum tora væl. Fyrsti tankin er kanska eitt sindur ræðandi, men so er bara at leypa í tað. Eg leggi stóran dent á, at myndirnar skulu verða stílfullar og ikki fúlar og flovisligar, sigur Miriam.

Hon og maðurin, Janus, taka nógvar brúdleypsmyndir, og hava tikið fleiri tølandi myndir av blívandi brúðrum, ið vilja geva manninum mynd í morgungávu.

– Míni ráð til eina og hvørja kvinnu, ið kemur til eina slíka myndatøku, er, at hon skal verða tilvitað um sín kropp og góðtaka hann fyri tað hann er, og síðani njóta løtuna. Tá gerst úrslitið altíð gott, greiður Miriam frá.

Boudoir-myndatøkan tekur umleið tveir tímar, og typiskt klæði at vera í til slíka myndatøku, er undirklæði, hatt og handskar.

Miriam hevur leigað eini hús í miðstaðarøkinum til endamálið.

**Eru mannfólk eisini vælkomin?**
- Nei, hetta er bara til kvinnur.

## INNIHALD

4 PERSÓNSSØGA: **HÁLENDSKA THREES ANNA LEITAR EFTIR FØROYUM**
6 TIPS: **KLÆDNAKRÓKAR**
8 REPORTASJA: **RÆTT KLØDD TIL ARBEIÐIS**
10 90 SEKUND: **ESMAR EYSTUROY SVARAR**
12 REPORTASJA: **PSYKOPATAR**
14 TIL ARBEIÐIS: **JÓGVAN VIÐ KELDU**
15 UMAFTURAFTURUMAFTUR: **HØGNI DJURHUUS**
16 HEILSUSÍÐAN: **SÓS, SEYÐUR OG SKUNDVERÐI**
18 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **BISCOTTI**
23 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

# Hjálp til sjálvhjálp

**KLUMMA**
**Jákup Mørk**
jakup@sosialurin.fo

Føroyingar hava altíð verið raskir at hjálpa, tá vanlukkur av ymsum slag taka seg upp úti í heimi. Ferð eftir ferð hoyra vit, at verður roknað upp á hvønn íbúgva, so teljast føroyingar millum heimsins raskastu at lata neyðhjálp. Hagtøl, sum vit kunnu breggja okkum av, hóast tað kanska eisini er nakað um tað, tá atfinningarsamar røddir siga, at hjálparhugurin hjá landsins borgarum er úrslit av ringari samvitsku mótvegis politisku skipanini, sum ov ofta spælir fríspæl í altjóða samfelagnum.

Hugaligt er í øllum førum at síggja, at tað eru mong í Føroyum, sum framvegis brýggja seg um næstrar sínar í altjóða samfelagnum. Líkamikið um talan er um fólk av Haiti, Indonesia ella kanska fólk, sum líða av álvarsamari sjúku.

Minni hugaligt er at síggja rákið, har tað spakuliga gerast fleiri og fleiri fyritøkur, sum royna at gera sær dælt av neyðini.

Tað gerst alt meira vanligt, at handilsligar fyritøkur promovera seg sjálvar við at siga: Keyp okkara vøru og vit lata x krónur til tað og tað endamálið.

Í best føri er talan um sjálvpromoverandi hjálpararbeiði, sum spælir upp til ringu samvitskuna hjá fólki. Í ringasta føri um lýsingarherferð, sum spælir upp til ringu samvitskuna hjá fólki, samstundis sum hon er beinleiðis yvirskotsgevandi til fyritøkuna. Hyklerisk hjálp til sjálvhjálp heldur enn hjálp til teirra, sum veruliga hava tørv á tí.

Er endamálið at stuðla, so latið stuðulin, uttan at brúka hetta sum sjálvpromovering. Skuldi tað verið, so seti heldur skelti við síðuna av vøruni við eini áheitan til kundan um, at hesin átti at umhugsa, um mann ikki var betur farin, um pengarnir vórðu lætnir bússuni til hjálp heldur enn til vøruna, sum ætlanin var at keypa.



VIKUSKIFTI
**Redaktørar:** Inna Törnroos og Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Jógvan við Keldu / Bárður Lydersen